Tórshavn, hin 03. mars 2009
Málnr.: 4518-200900182-1

**HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN**

Útgáva 1
**Matvørudeildin**

# Vegleiðing
## Mjólkarrúm og/ella fjós

**Endamál:**
Høli til savnan, køling og goymslu av rámjólk til víðari framleiðslu.

**Øki uttanfyri mjólkarrúm:**
Í minsta lagi 4x4m.

**Hølir:**
- Mjólkarrúm.
- Vesi og skiftirúm.
- Rúm ímillum mjólkarrúm og fjós.

**Innrætting:**
- Støddin á høli og øki uttanum skal vera hóskandi og nóg stórt soleiðis, at lættliga kann arbeiðast, uttan at vandi er fyri dálkan av rámjólkini.

**Uttanfyri mjólkarrúm:**
- Uttanfyri mjólkarrúm skal stoypast ella asfalterast, minst 4x4 metrar, við niðurrenning og halli frá mjólkarrúminum.
- Útiljós skal vera við úthurðina til mjólkarrúm.
- Slanga skal vera tøk at spula økið.
- Um neyðugt skal takrenna vera omanfyri úthurðina til mjólkarrúm.

**Mjólkarrúm:**
- Mjólkarrúm skal vera serstakt rúm við úthurð soleiðis, at mjólkarbilur kann koyra beinleiðis til rúmið.
- Mjólkarrúm skal ikki nýtast til annað enn mjólk og mjólkiútbúnað.
- Hondvask við heitum og køldum vatni í blandingsbattaríi skal vera.

**Rakstrarreglur:**
- Mjólkartangin skal spulast stutt aftaná, at hann er tømdur
- Hitin í mjólkartangum skal vera <2-3°C.
- Mjólk skal ikki goymast meiri enn 3 dagar í tangum.
- Vatn, sum verður nýtt at reingera mjólkiútbúnað o.a. við, skal hava drekkivatnsgóðsku.
- Sóping og annað arbeiði, sum kann dálka luftina í fjósinum, skal ikki gerast beint undan mjólking.
- Klútarnir skulu vaskast í vaskimaskinu við kókivask eftir mjólking.
- Reinhaldsreglugerð til mjólkiútbúnað, mjólkimaskinur o.a., sum hevur við mjólkingina at gera, skal hanga á einum sjónligum staði.
- Mjólkiútbúnaður og mjólkarrúm skulu til eina og hvørja tíð vera sjónliga rein.
- Slanga skal vera at spula mjólkarrúm við.
- Skáp, sum kann læsast, skal vera til heilivág.
- Dýr, ið ikki hava nakað við fjós at gera, skulu haldast burtur frá mjólkarrúmum.

**Tilfar:**
- Veggir og loft skulu vera úr vatnføstum tilfari, sum er slætt, ljóst á liti og lætt at halda reint.
- Gólv skal vera heilt og lætt at halda reint, og hall skal vera til niðurrenning við rist og vatnlási.
- Luftskiftið í mjólkarrúmi skal vera í lagi.
- Vindeygu, ið kunnu latast upp, skulu hava flugunet.
- Ljósviðurskifti skulu vera góð, og ljósperur/rør skulu vera bjálvað.

**Vesi og skiftirúm:**
- Vesi, við forrúmi, og skiftirúm til arbeiðsfólkini. Hondvask á vesinum ella í forrúminum. Skiftirúm kann góðtakast sum forrúm til vesi.

**Millumrúm:**
- Eitt rúm ella ein gongd skal vera ímillum mjólkarrúm og fjós. Um vesi er inn frá hesi millumgongd, kann millumgongdin góðtakast sum forrúm.

**Útbúnaður:**
- Møguleiki skal vera at vaska sær og skifta klæði.
- Við vaski skal vera flótandi sápa, eingangshandklæði og ruskílat.
- Vaskievni og amboð skulu goymast í skápi fyri seg.
- Íløt við sápu og lúti, ið eru sett beinleiðis til vaskiskipan, skulu standa upp frá gólvinum, og skal ongin leki vera.
- Vaskievni til mjólkiútbúnað skal vera egnað til matframleiðslu.

**Burturkastskipan:**
- Burturkast skal beinast út úr mjólkar-rúmum minst eina ferð dagliga og beinast burtur á ein fullgóðan hátt, samsvarandi kommunalu skipanini (KOB/IRF).
- Afturlatið rúm/bingja skal vera til burturkast.
- Ruskrúm ella bingjustað skal kunna spulast / vaskast.

**Persónligt reinføri:**
- Arbeiðsfólk skal bera hóskandi arbeiðsbúnað, sum skal vera reinur.

**Annað:**
- Arbeiðast skal soleiðis, at trygd verður veitt fyri, at rámjólkin ikki verður dálkað av nærumhvørvinum.
- Royking er bannað á øllum støðum, har matur verður viðgjørdur ella goymdur

Mint verður á, at hetta eru vegleiðandi krøv til innrætting av mjólkarrúmum.
Mett verður um hølisviðurskiftini og endalig avgerð verður tikin í hvørjum einstøkum føri.